Fiskirannsóknarstovan

# Samanbering av mathøgguslokki frá Føroyabanka við útlendskan agnhøgguslokk

Línutúrur á Føroyabanka við M/S Sigmundi FD 581

FRS smárit 03/03

# Túrfrágreiðing
# Línutúrur á Føroyabanka við M/s Sigmundi FD 581
# Samanbering av mathøgguslokki frá Føroyabanka við útlendskan agnhøgguslokk.
# Tíðarskeið: 18/06 - 30/06 – 2003

---

**Inngangur**
Hesin túrur við M/s Sigmundi varð gjørdur fyri at samanbera mathøgguslokk (*Loligo*) frá Føroyabanka við útlendskan agnhøgguslokk (*Todarotes sagittatus*).

Vit høvdu um eitt tons av mathøgguslokki av Føroyabanka (FB) við á túrinum. Hann varð fingin við Magnusi Heinsyni og ísaður. Síðan varð hann lagdur á frystugoymslu, har hann lá í hálvtannað ár. Hjá toskinum á Føroyabanka er høgguslokkur vanlig føði.

Undirritaði varð biðin um at fara við sum eygleiðari við M/s Sigmundi fyri Fiskirannsóknarstovuna at kanna veiðuna.

**Fiskireiðskapur**
Reiðskapurin, ið varð nýttur hendan túrin, var:

Svøvlalína 7,5 mm tjúkk, teymarnir 1,2 mm tjúkkir og 40 cm langir, húkarnir av slagnum superbait nr. 12.
Tað eru 1500 húkar á einum stokki, og teir hava 28 stokkar umborð, t.v.s. 42000 húkar.

**Veiðuorka**
Íalt vórðu settir 391800 húkar. Í miðal settu teir 39180 húkar pr. dag. Niðurmált varð 112700 pund (56 tons) í 10 dagar.

**Agn**
Vanliga brúka teir agnhøgguslokk, men tá ið teir royna á FB brúka teir eisini makrel. Høgguslokkur egnar seg best til egningamaskinuna, tí hann hongur betur á. Agnstøddin er um 23 til 25 mm.

**Seting**
So skjótt tað var liðugt at draga, var klárt at seta aftur; tað varð ikki sett eftir somu striku aftur, men um ein hálvfjórðing frá undanfarnu striku.

Teir høvdu 10 setur hendan túrin, og tað blivu settir um 27 stokkar hvørja ferð (39150 húkar).

**Arbeiðsháttur og úrslit**
Fyri at fáa eina mynd av, hvussu mathøgguslokkurin royndist, vóru tríggir stokkar egndir við hesum agni. Ein stokkur var í byrjanini, ein var í miðuni og ein var ímóti endanum á setuni. Allir fiskar, ið vóru á hesum stokkum, vórðu longdarmátaðir, og tað sama varð gjørt við stokkin, sum stóð antin frammanfyri ella tann ið kom aftaná, har agnhøgguslokkur var egndur.

Tað vísti seg at vera sera stórur munur á hvat fekst av toski í mun til agnslag.
Munurin á hýsu var ikki so stórur.

Toskur á mathøgg.: 714 pund pr. stokk - Toskur á agnhøgg.: 165 pund pr. stokk
Hýsa á mathøgg.: 93 pund pr. stokk - Hýsa á agnhøgg.: 73 pund pr. stokk

Toskur á mathøgg.: 729 stk. á 18 stokkum - Toskur á agnhøgg.: 233 stk. á 18 stokkum
Hýsa á mathøgg.: 416 stk. á 18 stokkum - Hýsa á agnhøgg.: 444 stk. á 18 stokkum

Tað var minni av brosmu, longu, skøtu og øðrum á mathøgguslokkinum í mun til á agnhøgguslokkinum (sí myndir aftast).

Vit egndu 200 húkar við hond við stórum agni (agnhøgguslokki), sum lá um 5 cm. Tað varð gjørt fyri at vita um tað fiskaði størri fisk. Hetta varð gjørt tríggjar ferðir, men tað er ringt at siga um tað royndist betri, tí henda royndin var ov lítil til at staðfesta nakran mun.

Sett varð mest um kvøldið og út á náttina, so dragingin byrjaði tíðliga á morgni. Men av tí at vit høvdu tríggjar stokkar egndar á setuni, so fingu vit bæði dýpdarmun og eisini tímatalið bleiv ymiskt, hvussu leingi húkurin var í sjónum. Tað kundi gera tað sama, tí tað var altíð meira á mathøgguslokkinum.

Eg fari at takka manningini á M/s Sigmundi fyri góðar dagar.

**Fiskirannsóknarstovan**

Mourits Mohr Joensen


Støddarbýti av toski (Samlað)
Línutúrur hjá M/S Sigmundi FD 581 á FB
tal
cm


Støddarbýti av hýsu (Samlað)
Línutúrur hjá M/S Sigmundi FD 581 á FB
tal
cm


Støddarbýti av toski,
fiskaður við mathøgguslokki
tal
cm


Støddarbýti av hýsu,
fiskað við mathøgguslokki
tal
cm


Støddarbýti av toski,
fiskaður við agnhøgguslokki
tal
cm


Støddarbýti av hýsu,
fiskað við agnhøgguslokki
tal
cm


Tal pr. fiskaslag
tal
FB høgg
Agn høgg
Toskur
Hýsa
Longa
Havtas
Brosm
Upsi
Skøta